gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Ógreið signal frá landsstýriskvinnu

## *Oddagrein*

TANN nýggja stýrisskipanin við ráðharrastýri og lóg um ábyrgd landsstýrismanna hevur havt stóra ávirkan á politiska lívið í Føroyum. Hóast stór framstig eru hend, er kortini nógv, sum vantar í, sum m.a. formaðurin í Fiskimannafelagnum hevur víst á. Tað verið seg bæði viðvíkjandi regluverki, siðvenju, embætismannaverki og tilvitanini um, at vit liva í einum rættarsamfelag.

EIN onnur lóg, sum eisini hevur sett sína týðuligu slóð, er lógin um fyrisiting og um alment innlit í fyrisiting okkara. Henda lógin kom seint. Hóast Føroya Blaðmannafelag strongdi á frá seinast í sjeytiárunum, fingu vit ikki hesa lóg fyrr enn miðskeiðis í nítiárunum. Men í dag kundu vit ikki hugsað okkum eitt samfelag uttan hesa lóg. Henda lógin er fyritreytin fyri, at vit hava eitt víst gjøgnumskygni í samfelagnum. Lógin er komin, og hon verður brúkt, men tað er heilt givið, at høvdu føroysku fjølmðlarnir havt størru orku var væl meiri komið fram.

HERFYRI kom undan kavi, at landsstýrismálanevndin hevði ikki fingið øll skjøl í samband við málið um pensjónirnar. Lógin um skjalainnlit hevur tryggjað, at vit fingu hesi skjøl hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum. Tey vísa m.a., at aðalstýrið nærum skuldsetir Almannastovuna fyri ikki at hava hildið landsins lóg í samband við kunngerðir um nakrar persónligar viðbøtur. Men fyrrverandi stjórin á Almannastovuni hevur bæði sett Almanna- og Heilsumálastýrið og landsstýrismannin so dyggiliga upp á pláss.

HVØRJAR avleiðingar hetta fær, er ikki greitt, tí hetta er jú sama mál, sum er kastibløðka millum landsstýrismálanevndina og løgmann - ivamálið um, um landsstýrismaðurin handfór lógina á rættan hátt, tá nýggju pensjónirnar vórðu settar í gildi. Hetta er eitt stórt og viðbrekið málsøki, sum málið um sjúkrahúsverkið og sjúkrahússtjóran fryi skjótt einum ári síðani vísti. Vit kunnu altíð diskutera, um landsstýrismaðurin klárar seg væl ella illa, men ikki skerst burtur, at signalini frá henni eru ikki altíð líka greið, og tað er óheppið. Líka so óheppið, sum at leggja eftir einum stovni, sum sambært fyrrverandi stjóran-um hevur sítt „á tí turra". Her kiksar okkurt í aðalstýrinum.

TAÐ kann ikki góðtakast! At so tvídráttur er komin í pensjónsmálið millum Fólkaflokin og Sjálvstýrisflokkin og kanska fakfeløgini við, er landsstýrisins søk. Og tað kunnu føroyingar bara fegnast um, so vit sleppa undan tí ósamhaldsfastu eftirlønarskipanini hjá Fólkaflokkinum.

***Sosialurin***

# Løgreglan gjørt ferðslukanningar í Vágum

*11. og 12. oktober gjørdi løgreglan og ferðsluløgreglan í Vágum ferðslukanningar kring oynna*

HEINI Í SKORINI



*Fleiri fingu bót í Vágum mikudagin og hósdagin, tá løgreglan gjørdi ferðslukanningar*

**Vágar:** Mikudagin 11. oktober fór løgreglan í Vágum saman við ferðsluløgregluni undir at gera kanningar í ferðsluni, sum heilt víst hevur givið eina heildarmeting av, hvussu lóglig føroyska ferðslan er.

Løgreglan byrjaði at gera kanningar mikudagin frá 17-18.30, og vóru ferðmátingar gjørdar í fjølbygdum øki á landsvegnum í Sandavági . Hetta tíðarskeiðið vóru 140 akfør skrásett at hava koyrt gjøgnum radarfeltið. 13 frágreiðingar vórðu skrivaðar fyri ferð frá 60 km/t til góðar 70 km/t. Av teimum 13 frágreiðingunum sum vóru gjørdar á landsvegnum í Sandavági, vóru fleiri frágreiðingar eisini skrivað fyri onnur brot á ferðslulógina, hóast upprunaliga ætlanin var at gera ferðmátingar. Millum annað kundi løgreglan staðfesta, at fleiri førarar ikki høvdu koyrikortið hjá sær, at koyriljósini hjá fleiri av akførunum ikki vóru sum tey skuldu, og so vóru fleiri, sum ikki nýttu trygdarbelti meðan koyrt varð.

Síðani varð hildið á við ferðslukanningum seinni um kvøldið, og var hetta í tíðarskeiðinum frá kl 20.15-21.30 á landsvegnum á Giljanesi. Tær kanningar, sum løgreglan gjørdi hetta kvøldið, verða róptar grein 13 kanningar. Umleið 40 akfør vórðu kannaði av løgregluni, og 15 frágreiðingar vórðu skrivaðar. Sum vera man kom løgreglan fram á nógv, ið ikki var lógligt, og á fleiri akførum var nógv, sum ikki var í lagi. Ljósini virkaðu ikki sum tey skuldu, dekkini vóru ikki í lagi, nógv høvdu ikki koyrikortið hjá sær, meðan trygdarbeltini heldur ikki vórðu nýtt.

Síðani varð hildið á við grein 13 kanningum sum fevndu yvir alla Vágoynna, og vóru hesar kanningar hósdagin 12. oktober í tíðarskeiðinum frá kl 7.30 á morgni til kl 13. Umleið 50 akfør vórðu kannaði í hesum tíðarskeiði, og av hesum 50 akførum vórðu 24 frágreiðingar skrivaðar av løgregluni. Løgreglan kundi eftir hesar frágreiðingar staðfesta, at á saman hátt sum við hinum ferðslukanningunum vóru feilir á ljósunum, meðan nøkur av akførunum ið vóru kannaði, ikki høvdu nakra nummarplátu á akfarinum. Síðani kom løgreglan eisini fram á áðurnevndu feilirnar, sum t.d. at koyriljósini ikki vóru tendrað, at nøkur ikki høvdu koyrikortið hjá sær, meðan uppaftur onnur ikki nýttu trygdarbeltið.

Hetta er ikki eitt tiltak, ið javnan og regluliga er á skránni hjá føroysku løgregluni, men fyri nøkrum árum síðani varð ein slík kanning gjørd, sum fevndi yvir alt landið. Løgreglan í Vágum sigur, at tað er neyðugt við slíkum kanningum av og á.

Løgreglan í Vágum heldur eisini, at hyggja vit at nøgdini av bilum sum vóru steðgaðir, og hvussu nógv fingu bót, skuldi talið helst verið minni, hóast tað ikki er eitt óvæntað tal av bótum og ólógligari koyring, sum varð givið undir ferðslukanningunum.

# Nýggjur hvítvøruhandil á Hálsi

*EL-Keyp er navnið á nýggja hvítvøruhandlinum, sum í dag sær dagsins ljós uppi á Hálsi*

HEINI Í SKORINI

Ein nýggjur hvítvøruhandil letur í dag upp á Hálsi, og er tað Poul Jacobsen, sum er stjóri í nýggja handlinum. Navnið á handlinum er EL-Keyp, og er hann partur av vælkendu handilsketuna EL-Køb, sum hevur 35-40% av marknaðinum í Danmark.

Poul Jacobsen, stjóri í nýggja hvítvøruhandlinum, sigur, at allar vanligar hvítvørur kunnu fáast til keyps, samstundis sum smálutir innan el-tól eisini verða seldir í nýggja handlinum.

El-Keyp fer at liggja í nýggjum høli við síðuna av Køksmiðstøðini, og sambært Poul Jacobsen hóskar tað eisini sera væl fyri handilin at liggja har, við tað at hatta er ein sokallað miðstøð fyri húsharhaldstól.

- Vit síggja fleiri og størri møguleikar við at fara uppí handilsketuna EL-Køb, tí har fáa vit bestu prísirnar sum eru á marknaðinum, sigur Poul Jacobsen við Sosialin. Poul leggur afturat, at tað hevur leingi verið arbeitt við hesi ætlan, og nú er so klárt at lata upp.

Vinjard Johansen og Jarnold Nattestad reka handilin, sum í dag letur upp á Hálsi.



*Nýggi hvítvøruhandilin El-Keyp letur fyri fyrstu ferð upp í dag, og er handilin partur av handilsketuni El-Køb*



